VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið minni vindur og møguliga regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin lot av landnyrðingi, men sunnudagin upp í hvassan vind. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 11 stig.

Dósa-øl og nýggj fløska

BRYGGING

Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Skal tað var blikk, os lat tað vera blikk. Soleiðis tekur stjórin í Føroya Bjór til, nú bryggjaríið í Klaksvík sendir 5-liturs øldósir á marknaðin. Harafturat kemur bryggjaríið við eini aluminumsfløsku, sum er alternativ til vanligu ølfløskuna

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevu júst umhvørvisgóðkent nýggju framleiðslu, sum umframt dósaøl eisini hevur góðkent at tappa øl í aluminiumsfløskur, sum eru í vanligari stødd.

Afturat hesum koyrir Føroya Bjór eitt minifatølsanlegg á marknaðin í avmarkaðum nøgdum, sum 5-liturs dósin kann tappast frá. Tað er ikki neyðugt at brúka anlegg, men fyrimunurin við hesum er, at ølið tá heldur sær upp í tværtríggjar vikur. Tað ber eisini væl til at fáa sær ølið uttan at hava anlegg, men tað heldur sær bert í eitt døgn, eftir at blikkið er latið upp.

Íløgan til tapping av 5-liturs blikkum er hálvautomatisk og munandi minni, enn ein møgulig íløgu í tapping av blikkum í vanligari stødd. Ein slík íløgu kostar eini átta mió. kr., sigur stjórin á Føroya Bjór. Øl í stórari aluminiumsdós er ikki ókent aðrastaðni. Til dømis hava týsk bryggjaríir framleitt øl í 5-litursdósum í eini fimm ár.

- Hetta skuldi alt verið klárt at koyrt á marknaðin fyri einum mánaði síðani, men hevur drigið út, sigur Einar Waag.

Stjórin á Føroya Bjór hevur annars ikki verið serliga fegin um, at loyvi verður givið at bryggja øl í dósum, tí hetta letur upp fyri, at útlendskt øl og sodavatn floymir inn yvir føroyska marknaðin.

Pant skal latast fyri nýggju produktinil. Fýra krónur fyri dósina, og tvær krónur fyri fløskuna.

Nýggju vørurnar hjá Føroya Bjór hava staðið klárar í eina tíð, men hava bíðað eftir umhvørvisloyvi, sum nú er komið

Mynd: Álvur Haraldsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	4
Nuuk	2
Qaqortoq	4
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	8
Lerwick	11
Aberdeen	10
London	15
Tromsø	--
Bergen	19
Oslo	--
Stokkhólm	16
Keypmannah.	14
Helsinki	17
Moskva	20
Berlin	18
Warzawa	25
Kiev	30
Bukarest	24
Paris	21
Madrid	18
Róm	26
Malorca	24
Athen	29
Malta	30
Tunis	29
Beijing	31
New Dehli	25
Bangkok	34
Jakarta	30
Sydney	15
New York	26
Miami	26
Los Angeles	20
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Esitt hátrýst, 1022 hPa. norðan fyri Føroyar stendur í stað og viknar nakað.



Í dag:
Hátrýstið norðan fyri Føroyar stendur framvegis í stað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 16/6 kl. 06^{00} – 17/6. 06^{00}. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 16/6 kl. 06^{00}– 17/6 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

12. juni	Mánin næstur jørðini
15. juni	Tendring
22. juni	Fyrra kvarter
24. juni	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
19. Juni	11.05	23.28	10.05	22.28	10.20	22.43	00.43	13.05	01.43	14.05	09.20	21.43	08.20	20.43	11.20	23.43	-	12.20	10.50	23.13	-	12.05
20. Juni	11.49	-	10.49	23.10	11.04	23.25	01.28	13.49	02.28	14.49	10.04	22.25	09.04	21.25	-	12.04	00.43	13.04	11.34	23.55	00.28	12.49
21. Juni	00.10	12.29	11.29	23.49	11.44	-	02.10	14.29	03.10	15.29	10.44	23.04	09.44	22.04	00.25	12.44	01.25	13.44	-	12.14	01.10	13.29
22. Juni	00.49	13.21	-	12.21	00.04	12.36	02.49	15.21	03.49	16.21	11.36	-	10.36	23.09	01.04	13.36	02.04	14.36	00.34	13.06	01.49	14.21
23. Juni	01.54	14.27	00.54	13.27	01.09	13.42	03.54	16.27	04.54	17.27	00.09	12.42	11.42	-	02.09	14.42	03.09	15.42	01.39	14.12	02.54	15.27